# Helt tey sendu apríl á jólum



*Tað eydnaðist Petru og Hans Jørgini at fáa alla vøruna ígjøgnum kassan, innan tilmálda tíðin var av. Her hjálpa starvsfólkini teimum at fylla posarnar*

**Mikudagin sluppu Petra og Hans Jørgin Nysted úr Hvannasundi í Miklagarð í SMS at fylla so nógv í vognin, sum tey megnaðu í 10 minuttir. Tey gjørdust nevniliga hepnu vinnararnir av stóru haldarakappingini, sum Sosialurin skrivaði út undan jólum. Hóast tað var Hans Jørgin, sum hevði vunnið, so helt hann, at tá ið kona hansara hevði keypt inn til húarhaldið øll 23 árini, tey hava verið gift, so skuldi hon eisini gera tað hesa ferð. Og rætt gjørdi hann, tí Petra fekk væl burturúr**

VINNINGUR
*Orð: Rúna Sivertsen*
*Myndir: Jens K. Vang*

- Eg var eftir gággum, tá ið elsti sonurin ringdi umborð og segði, at Sosialurin hevði ringt. Eg hugsaði bara, at teir vildu spyrja meg um eitthvørt viðvíkjandi útróðri, tí tað eri eg onkuntíð fyrr spurdur um av fjølmiðlunum, sigur Hans Jørgin.

Um sekstíðina seinnapartin, tá Hans Jørgin kom til hús henda dagin, royndi hann at ringja á fartelefonina, hann hevði fingið nummarið á, men hon svaraði ikki. Dagin eftir royndi hann aftur, men tá var Sosialurin farin í jólafrí.

Tá so verdóttirin ringdi og segði Petru, konu Hans Jørgin, at tey høvdu vunnið ein stóran vinning í Sosialinum, helt hon, at verdóttirin spældi henni eitt puss.

- Eg visti als ikki, at vit vóru við í kappingini, tí eg helt, hon bara var fyri nýggjar haldarar, sigur Petra.

Men nei; tað stóð svart upp á hvítt í Sosialinum, at Hans Jørgin Nysted í Hvannasundi, hevði vunnið eina ferð við Norrønu fyri tvey vaksin og tvey børn við bili. Eina innkeypsferð í Miklagarði í 10 minuttir - og 20 gávukort á 200 krónur, sum handlarnir í Miklagarði hava givið.

Petra helt, at tað kundi ikki bera til, at tey høvdu vunnið alt, ið har stóð nevnt; tað mátti heldur vera tann eina av lutunum, tey høvdu vunnið.

Ikki fyrrenn Petra og Hans Jørgin við sínum egnu eygum lósu Sosialin dagin eftir, trúðu tey, at tey veruliga høvdu vunnið stóra vinningin.

### Stuttligur túrur

- Vit fóru til Havnar týsdagin, so vit kundu fyrireika okkum til innkeypstúrin, men eisini fyri at hugna okkum, siga tey bæði.

Petra og Hans Jørgin fingu sær kamar á sjómansheiminum, og síðani fóru tey í Miklagarð at hyggja, hvat handilin hevði at bjóða.

Petra sigur frá, at tey týskvøldið vóru og bowlaðu. Flennandi sigur hon, at hon smurdi Hans Jørgin av.

Mikumorgunin kl. 9 skuldi so slagið standa. Bert annað av teimum slapp at fylla vognin, og tað skuldi Petra gera, hevði Hans Jørgin gjørt av.

Teir tilmáldu 10 minuttirnir vóru at rokna frá tí løtu, hon loysti vognin, til alt var komið gjøgnum kassan. So tað ráddi um at skunda sær, so mest kundi fáast burturúr.

Fyrst var Petra heldur smæðin og komdi sær ikki væl at leika so í. Men so hvørt minuttirnir gingu, gloymdi hon alt rundanum seg og tuskaði og rann, og legði líka í, hvønn hon trokaði til viks.

Og væl kom burturúr hjá henni. Tá ið seks minuttir vóru eftir, fór hon til kassan, og tað eydnaðist henni at fáa alla vøruna ígjøgnum, áðrenn tíðin var úti. Uppá 10 minuttir megnaði Petra at keypa fyri 6.152 krónur og 82 oyru.

Petra sigur, at hon var móð, tá ið hon kom til kassan. Men hetta var ein sera stuttligur innkeypstúrur, siga Petra og Hans Jørgin.

Samlaða virði á vinninginum, sum hepnu hvannasundshjúnini vunnu, var nú komið uppá 25.000 krónur.

Ikki so galið, tá ið tú als ikki veitst, at tú ert við í nøkrum lutakasti um nakað sum helst...







